**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

# Starvsfólk

Eitt fulltíðarstarv í Heimarøktini og Serforsorgini, innan lønar- og starvsfólkaøki er leyst til setan frá 1. okt. 2006 ella skjótast tilber.

Setanarstaður er Heimarøktin og Serforsorgin, Meginskrivstovan.

**Uppgávurnar sum starvsfólkið kemir at hava um hendi eru:**
- Setanarbrøv til starvsfólk fyri allar deildir innan øki.
- Innplasering sambært sáttmála
- Málsviðgerð í sambandi við lønar- og starvsfólkamál
- Leiðbeina og ráðgeva starvsfólki í sáttmálaspurningum
- Taka lut í arbeiðinum við vaktplanskipanini og arbeiðinum í samband við nýggju lønarskipanina
- Avgreiða lønir til útgjald.
- Ráðgeva leiðsluni í lønar- og starvsfólkamálum og sáttmálaspurningum

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving
- Hollar royndir at arbeiða við lønun- og starvsfólkamálum innan almennu fyrisitingina
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Góð samstarvsevnir og vera før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum.
- Góðan røkiskap.
- Dugir væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri førleikamenning
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri

**Lønar-og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Tú kanst fáa meira at vita við at venda tær til Sólvør Simonsen ella Ingrid Gregersen, lønardeildina, á telefon 304014 og 304009.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Eirargarður 2, 2 hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Virkandi stjóra, Regin Johansen

**Umsóknarfreist:** 15. august 2006

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

## Vinnumálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til avloysarastarv

Fyri løgfrøðing í farloyvi søkir Vinnumálaráðið eftir løgfrøðingi. Talan er um eitt fulltíðar barsilsavloysarastarv frá 18. september 2006 og 6 mánaðir fram við møguleika fyri leingjan.

**Arbeiðið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At veita landsstýrismanninum og stjóranum løgfrøðiliga ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv (cand.jur.). Umsøkjarar, ið hava staðið bachelor útbúgving í løgfrøði, eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsøkjarar skulu duga føroyskt og enskt væl, umframt at umsøkjarar skulu hava kunnleika til EDV.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir Vinnumálaráðnum, umframt onnur stjórnarráð.

Umsókn, saman við prógvum, CV, viðmælum o.ø., skal verða send til

**Vinnumálaráðið**
**Postsmoga 377**
**110 Tórshavn**

Freistin at søkja er ***mánadagin 14. august 2006.***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, stjóra, tlf. 356070.

FAROE
LAW
Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**

**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo




*"Enniberg"*

Útferð til Enniberg hvønn dag kl. 15:00. (Vit sigla um bert ein møtir upp). max. 25 ferðafólk. Kostn. 250 kr./fólk. Túralongd $2^{1/2}$ tími. Vit koma tætt til tann nógva fuglin.

Ring: m/b Alpha Pilot
Telefon 220849

## HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann i dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00

## Starvsfólk

Vegna økt virksemi søkja vit eftir starvsfólki

Vit søkja eftir:
- Handilslæning (til handil)
- Lagurmann (til lagur og útkoyring)
- Snikkara/timburmann e.l. (til uppsetan og samling av køkum)

Løn og arbeiðistíðir eftir avtalu

**Kvik Køkssentrið**
Hoyvíksvegur 65 · 100 Tórshavn
tel. 312480 · fax 319718

kvik

Kvik Køkar er ein fyritøka, ið varð stovnað í 1991. Vit selja køkar, baðirúm, klædnaskáp, hvítvørur og tilhoyr. Eisini hava vit eina deild við gávulutum og brúkslist

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk